## Als ongin vansi

**Tríggjar kvinnur og tveir menn sita í Havnanevndini í Tórshavnar býráð. Formaður er Leivur Hansen. Hann dugir als ikki at síggja nakran vansa í tí og væntar eitt minst líka gott samstarv í nevndini hetta valskeiðið sum undanfarna**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hava kvinnurnar meirilutan í Havnanevndini í Tórshavnar býráð. Tær tríggjar, Annika Olsen, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrina Frýdal manna nevndina saman við Leivi Hansen, núverandi formanni og Bjarta Mohr fyrrverandi formanni.

Leivur Hansen, sum sat í nevndini farna valskeið, er nú formaður, og hann hevur ongantíð roynt hetta áður. Men hann leggur dent á, at hann als ikki dugir at síggja nakran sum helst vansa í, at kvinnurnar hava meirilutan í einari nevnd sum Havnanevndini.

– Vit eru væl øll har fyri at menna Tórshavnar Havn og harvið inntøkurnar hjá kommununi og havnini, so kann tað vera líkamikið, um man er kvinna ella maður, slær Leivur fast.

– Tað hevur onkuntíð áður verið onkur einstøk kvinna í nevndini, men ongantíð tvær og so slettis ikki tríggjar, sigur Leivur Hansen, sum heldur, at tað er bara gott, at kvinnurnar eisini koma í slíkar nevndir.

Hann heldur, at hetta so avgjørt vísir, at kvinnur hava áhuga fyri øðrum enn bara teimum bleytu virðunum, og at tær hava meiningar um onnur ting. Eitt nú havnaviðurskiftini í kommununi.

### Uttan lóggávu

Leivur Hansen sigur, at við seinasta kommunuvalið hevur kommunan fingið tað býtið millum menn og kvinnur, sum so nógv er rópt um seinastu árini.

– Tað er útmerkað og enn og betur, at vit megnaðu at fáa hetta javna býtið uttan lóggávu, sigur Leivur, sum heldur fram, at veljarin hevur talað, og tað skal hann framhaldandi eisini sleppa. Hann heldur als ikki, at ein lóggáva á hesum økinum hevði verið góð. Hinvegin heldur hann, at hon hevði avmarkað fólkaræðið.

Havnanevndin fer eisini at hava sín fyrsta fund í komandi viku, har tey fara at skipa seg og áseta fundardagar. Men á skránni verður eisini ein kunning um øll tey viðurskiftini og málini, sum eru í Havnanevndini, fyri teimum trimum nýggju limunum.

– Vit kenna tað sum okkara skyldu at kunna teir nýggju limirnar um arbeiðið, sum gongur fyri í nevndini, sigur Leivur.

Hann sat í Havnanevndini í andstøðu seinasta valskeiðið, men hann sigur, at Havnanevndin er ein sera góð nevnd at sita í – óansæð um tað er í andstøðu ella samgongu.

– Samstarvið í nevndini hevur verið avbera gott ta tíðina eg havi verið í henni, og eg rokni heilt avgjørt við, at tað fer at halda fram, sigur formaðurin í Havnanevndini í Tórshavnar býráð, Leivur Hansen.



*Frá vinstru: Annika Olsen, Bjarti Mohr, Leivur Hansen, formaður, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrina Frýdal*

*Mynd: Jan Müller*

# Kvinnur ráða fyri borgum



*Kvinnuligi meirilutin í Tórshavnar býráð sást væl aftur í nevndarsessunum*

*Mynd: Jan Müller*

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð eru kvinnurnar í meiriluta í Tórshavnar býráð. Hetta sást eisini aftur í fleiri av nevndunum. Eitt nú í Mentamálanevndini, Havnanevndini og Heilsunevndini**

TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Tá nýggja samgonguskjalið varð undirskrivað, var samstundis greitt, at kvinnurnar eru í meiriluta í nýggjum samgonguni í Tórshavnar býráð. Hetta fyri fyrstu ferð nakrantíð, og tað sást eisini væl aftur í býtinum av nevndarsessum, har tvær nevndir hava fýra kvinnulig umboð og einans eitt mannfólk.

Tórshavnar býráð er býtt upp í sjey vanligar býráðsnevndir og so seks økis ella bygdanevndir. Av teimum sjey hava kvinnurnar meirilutan í fýra av teimum. Tað er í Mentamálanevndini, Sosialu nevnd, Heilsunevndini og Havnanevndini.

Tað mest merkisverda er kanska, at kvinnurnar eru í meiriluta í Havnanevndini, meðan tað kanska ikki tykist so løgið, at tær eru í meiriluta í Mentamálanevndini og Sosialu nevnd.

Hinvegin er tað kanska ikki so løgið kortini, tí hetta er fyrstu ferð, at Tórshavnar býráð hevur so nógvar kvinnur, at býtið kann verða meiri náttúrligt, og at tær kvinnurnar, sum hava hug til at sleppa fram at øðrum nevndum enn teimum, har tey bleytu virðini verða viðgjørd, sleppa tað.

Við blaðið í gjár segði Hildur Eyðunsdóttir, sum er forkvinna í Mentamálanevndini, at meirilutin hevði lagt seg eftir ikki at hava nakra nevnd við bara kvinnum. Men eitt nú í Mentamálanevndini og í Heilsu nevndini situr bert ein maður og fýra kvinnur. Tað er tó ein nevnd, sum bert er mannað av monnum, og tað er Fíggjarnevndin, har borgarstjórin altíð er fastur formaður.

Tað letur til, at borgarar í Tórshavnar kommunu vænta sær nógv av nýggja býráðnum. Hetta kom Hildur Eyðunsdóttir eisini inn á í blaðnum í gjár, og hon segði, at tað gjørdi tað sera spennandi at fara til arbeiðis. Tað man vera galdandi fyri alt tað nýggja býráðið. Hetta er jú fyrstu ferð, at tey skulu arbeiða saman, har býtið millum menn og kvinnur er so javnt, sum tað kann vera.





*Her eru Mentamálanevndin og Sosiala nevnd, har Hildur Eyðunsdóttir og Katrin Dahl Jakobsen eru í oddinum*

*Myndir: Jan Müller*